# Dimmalætting

Leygardagur

– ÁLÍTANDI TÍÐINDI

Nr. 180 • 119. árgangur • 2. november 1996 • Tlf. 11212 • Fax 10941 • e-mail: dimma@olivant.fo

7 kr.


»Okkara Gulu«

»Viðskerin«

# Arabo fjórði uppsagdi almenni stjórin

Síðan Sámal P. í Grund tók við sum landsstýrismaður, eru fýra almennir stjórar sagdir úr starvi. Tað kom ikki óvart á tann fjórða, Thomas Arabo, sum hevði væntað uppsøgnina.

NICLAS JOHANNESEN/
GRÆKARIS D. MAGNUSSEN

Friggjadagin kom fjórða uppsøgnin av einum almennum stjóra, síðan Sámal P. í Grund tók við sum landsstýrismaður við samferðslumálum.

Fyrst var tað stjórin á Atlantsflog, Heri Mortensen, síðan Sólbjørn Jacobsen, Telefonverkið, nr. 3 var Magnus Danielsen, Telefonverkið, og nú at enda stjórin á Strandferðsluni, Thomas Arabo.

Thomas Arabo var staddur í Klaksvík, tá hann fekk boðini úr landsstýrinum.

– Hetta hevur verið undir uppsigling eina tíð. Tað havi eg merkt á teimum spurningum, sum komnir eru úr Tinganesi, sigur Thomas Arabo.

Í blaðnum hósdagfin skrivaðu vit, at Strandferðslan enn einaferð hevði fingið harðan kritikk.



Løgmaður helt minningartaluna í Meinigheitshúsinum og legði seinni kransin við minnisvarða teirra sjólátnu í Viðarlundini



Myndir: Dia Midjord

Presturin Bergur Debes Joensen talaði á minningarhaldinum fyri teim sjólátnu. Fitt av fólki vóru eisini samankomin til minningarløtuna við minnisvarðan, hóast kalt var í veðrinum

# Allahalgannadagur – havið tók ongan

Minningarhald fyri teim sjólátnu varð hildið um alt landið í gjár. Hóast dagurin er halgaður øllum teim sjólátnu, so kundu vit hesaferð fegnast um, at eingin er sjólætin hetta árið.

DIA MIDJORD

Minningarhald fyri teim sjólátnu varð hildið kring alt landið í gjár. Í høvuðsstaðnum hevur minningarhaldið undanfarin ár verið hildið á Tórshavnar Sjómansheimi, men vegna umbygging varð minningarhaldið flutt niðan í Meinigheitshúsið, har løgmaður Edmund Joensen flutti fram minningarrøðu og presturin Bergur D. Joensen talaði.

Eftir minningarhaldið í Meinigheitshúsinum varð farið niðan til minnisvarðan í Viðarlundini, har løgmaður legði krans við minnisvarðan, og presturin bað bøn og signing. Fitt av fólkum vóru samankomin til minningarhaldið í ár, hóast tað var heldur kalt í veðrinum.

Løgmaður segði eitt nú í røðuni í Meinigheitshúsinum, at árið í ár var eitt hendingaár. Tað er fyrstu ferð vit vita um, at eingin er sjólátin. Hann takkaði Harranum fyri, at hann hevur spart okkum, síðani fjøldin seinast savnaðist til minningarhald.

Løgmaður segði víðari, at samstundis sum tað er ein lætti, at eingin er farin á sjónum seinasta árið, so slepst tó ikki undan, at óhapp og vanlukkur henda á landi við sakni og stórari sorg í kjalarvørrinum.

– Óvarandi hendingar loyptu hvøkk á okkum. Lagnutunga flogvanlukkan í Selvík minti okkum aftur einaferð á, hvussu stokkut løtan er millum lív og deyð, segði løgmaður.

Hann vísti á, at lagnutungar hendingar skaka samfelagið. Tá onkur fellur frá, so merkist tað. Tá er tað skyldmaðurin, vinmaðurin, bygdamaðurin ella ein av landsmonnum okkara, ið er farin. Føroyingar standa tá saman um bygdina, um oynna og alt landið.

Samankomna fjøldin í Meinigheitshúsinum reistist at enda og mintist tey sjólátnu, ið undan eru farin og tey, sum á ymsan hátt ikki bóru boð aftur í bý.

# Gevast at bora um vikuskiftið



Boritornið í Lopra verður nú tikið niður, tí teir eru komnir á mál. Upprunaliga ætlanin var at bora niður á 3.500 metrar, men tað ber enn ikki til at fáa upplýsingar um, hvussu langt niður borurin er komin, nú teir gevast við verkætlanini

Arne Rosenkrands Larsen frá Dopas sigur, at teir eru komnir so mikið langt í Lopra, at boringin steðgar í vikuskiftinum. Framvegis er einki líkið út - hvørki olja ella upplýsingar.

DIA MIDJORD

– Tað gongur avbera væl. Vit eru komnir so mikið langt, at vit hava fingið tær upplýsingar, ið vit vildu hava at vita, sigur leiðarin fyri boriætlanina í Lopra, Arne Rosenkrands Larsen.

Hann vil framvegis einki siga um, hvussu langt borurin er komin niður í undirgrundina. Hann vísir á, at oljufeløgini, ið rinda fyri boringina, eiga upplýsingarnar. Tey skulu sostatt avgera, um eitt tíðindaskriv skal fara út við nøkrum upplýsingum frá boringini.

– Men tað liggur víst, at vit gevast her í vikuskiftinum, sigur Arne Rosenkrands Larsen og leggur aftrat, at teir hava brúkt ein rúgvu av serligari útgerð til seinastu metrarnar.

– Tað hevur stóran týdning, at vit fáa so nógvar upplýsingar sum gjørligt um undirgrundartilfarið, ið vit hava borað ígjøgnum.

– Eitt nú hava vit brúkt ein stóran vibrator seinastu tíðina í staðin fyri dynamitt ella luftkanónir, ið vanliga verða brúkt til seismiskar mátingar. Hesin vibrator fer ikki so illa við umhvørvinum, sigur Arne Rosenkrands Larsen.

Fíggjarliga hevur tað kosta um fjøruti milliónir at gjøgnumføra boringina í Lopra.

## Í BLAÐNUM Í DAG



### Toppur og botnur til sjóndar í hondbólti og flogbólti

Hetta vikuskiftið flyta nógvar hendur kring landið bæði hondbóltar og flogbóltar – ávikavist í net og uppum net. Hóast ikki so langt er útliðið í kappingunum báðum, byrjar tað so spakuliga at mynda seg, hvørji lið manna topp og botn í hondbólti og flogbólti.

Ítróttur, síða 6 og 7

### Eingin svartkjaftur fyri makrelin

Á seinastu samráðingunum við ES kom fram, at føroyingar hava veitt meira av makreli í ES sjógvi, enn vit eiga. Síðani er komið fram, at føroyingfar lata svartkjaft afturfyri. Men hetta er ikki heilt rætt, sambært Kaj Mortensen, fiskivinnustjóra.

Síða 4

### Tryggingartakarar síggja nú ein bata fyri framman

Nýggja felagið hjá tryggingartakarum – Tryggingarbati – er so smátt farið at virka. At tryggingartakarar fáa ein kærumøguleika í tryggingarmálum, hevur verið eitt av høvuðsmálunum higartil, og komið er væl áleiðis. Ein almennur fundur í komandi viku fer at vísa, hvussu langt hetta málið er komið.

Síða 4

### Bonk Expo framsýning í Norðurlandahúsinum

Í morgin letur upp framsýningin Bonk Expo. Í sambandi við upplatingina av framsýningini heldur Head of Product Development, Alvar Gullichsen, fyrilestur um The Incredible of Bonk Business Inc.

Síða 10

### Gadaffi gevur USA skyldina fyri AIDS

Libiski leiðarin Muammar Gadaffi hevur sum so einki ímóti amerikanska forsetanum Bill Clinton. Hinvegin leggur hann nú USA undir at hava framleitt AIDS-virusið.

Síða 8


Vit prenta
visittkort, brævørk
brævbjálvar
skjótt og væl



Dimmalætting
Tlf. 11212
Fax 17681

TEORISKEIÐ



Byrjar 11. november
Roynd ætlandi 17. des.
Ólavur W. Høgnesen
Bøkjarabrekka 9 • 88 157

MUSIKKINSTRUMENT
Landsins størsta og besta úrval av musikkinstrumentum




ELDING
SMS • Tlf. 18662 - 18663

DAGSINS RÆTTUR
MÁNADAG 04.11.:
Stokt medistarpylsa
TÝSDAG 05.11.:
Bankikjøt
MIKUDAG 06.11.:
Stokt flak
ella biksimatur
HÓSDAG 07.11.:
Hamburgarryggur
FRÍGGJADAG 08.11.:
Fleskasteik
LEYGARDAG 09.11.:
Snitzel
VIKA 45
Perlan